STUTT SAGT

## Betri eftirlit við útreiðslum

Í USA hevur Senatið samtykt, at í framtíðini skal George W. Bush, forseti, ikki brúka meiri pengar til bardagan ímóti yvirgangi, enn fíggjarlógin sigur. Við øðrum orðum kann forsetin ikki brúka tær sokallaðu neyðlógirnar, sum higartil hava givið honum heimild til at biðja um meiri pengar, tá hann hevur hildið tað vera neyðugt.

Tað er ein sannroynd, at nógv av tí, sum forsetin hevur fingið játtað við at vísa til neyðlógirnar, er farið til krígsførsluna í Irak og Afghanistan, og ofta hava málini havt slíkan skund, at senatorarnir hava hildið seg fáa ov lítla tíð til at viðgera tey. Tá forsetin fyri nøkrum døgum síðani bað um góðar 350 milliardir krónur afturat við at vísa til neyðlógirnar, var bikarið fult hjá Senatinum. Við 98 atkvøðum fyri og ongari ímóti samtykti Senatið at broyta mannagongdina.

Demokratarnir og nógvir republikanarar leggja forsetan undir at brúka neyðlógirnar fyri at fjala tær ovurhonds stóru útreiðslurnar av bardaganum ímóti yvirgangi. Forsetin og stjórnin siga, at tað ber ikki til at hava eina fasta játtan til endamálið, tí tað ber ikki til at siga frammanundan, hvat eitt kríggj fer at kosta.

## Dýrur røðari

Síðani hann fór frá, hevur fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton hildið røður um mong ymisk evni víða hvar um heimin, og fólk eru til reiðar at gjalda nógv fyri at sleppa at hoyra hann. Tað ávirkar sum vera man samsýningina, og sambært AP fekk Clinton einar 45 milliónir krónur í fjør fyri at halda røðu ymsastaðni. Orsøkin til, at talið er alment, er, at Hillary Clinton er senatorur og skal tí geva upp, hvussu nógv hjúnarfelagin forvinnur.

Jay Carson, sum er talsmaður hjá Bill Clinton, sigur við AP, at fyrrverandi forsetin hevði óvanliga nógv at gera í fjør. Hann helt 42 røður. Tann minsta samsýningin var beint niðan fyri eina millión krónur, men fyri at halda tvær røður í Kanada fekk Clinton næstan fimm milliónir krónur.

Clinton-hjúnini hava ikki liðið neyð, síðani tey fóru úr Hvítu Húsunum. Tvørturímóti hava tey forvunnið nógvar pengar burtur úr røðum og bókaútgávum. Harafturat fær Hillary sína føstu løn sum senatorur.

## Svik við neyðhjálp

Tá ódnin Katrina legði stórar partar av amerikanska býnum New Orleans í oyði fyri skjótt einum ári síðani, játtaði amerikanska Kongressin nógvar milliardir krónur í neyðhjálp.

Nú vísir tað seg, at minst átta milliardir krónur hvurvu á vegnum og komu tí ongantíð teimum neyðstøddu til góðar. Grannskoðanin hjá Kongressini er komin eftir, at í veruleikanum játtaðu politikararnir pengar til fleiri hjálpartiltøk, sum als ikki vóru til. Tvørturímóti blivu pengarnir brúktir til atgongumerki til fótbóltsdystir, skreytlutir av ymsum slagi og dýrar frítíðarferðin, og tað finnast eisini dømi um, at neyðhjálparpengar blivu brúktir til kynsligar tænastur, sigur grannskoðanin hjá Kongressini.

Sambært grannskoðanini umfatar svikið 16 prosent av allari neyðhjálpini, sum Kongressin játtaði.

## Tað almenna brúkar ov nógv

Ein uppgerð hjá Danske Bank vísir, at danska stjórnin hevur ikki megnað at steðga teimum almennu útreiðslunum, sum stjórnin annars setti sær fyri. Uppgerðin vísir, at tann almenna nýtslan er vaksin 11 milliardir krónur meiri, enn tann sokallaða 2010-ætlanin hjá stjórnini sigur.

Thor Pedersen, fíggjarmálaráðharri, sigur við Berlingarin, at stjórnin hevur tamarhald á sínum útreiðslum, men at tað eru kommunurnar, sum brúka meiri enn ætlað. Tað kemst av, at kommunurnar hava fingið størri sjálvræði, og tí er tað truplari hjá stjórnini at avmarka tær kommunalu útreiðslurnar, sigur hann.

Skattamálaráðharrin, Kristian Jensen, leggur eisini ábyrgdina á kommunurnar og sigur, at tær øktu kommunalu útreiðslurnar hava gjørt, at skattasteðgurin hjá stjórnini hevur ikki virkað eftir ætlan

UTTAN ÚR HEIMI

# Ongantíð so nógv rúsevni úr Afghanistan sum nú

**Undir Taliban-stýrinum sluppu bøndurnir í Afghanistan ikki at dyrka opium, men nú dyrka teir næstan einki annað**

RÚSEVNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Umleið 90 prosent av øllum heroini, sum verður selt á altjóða marknaðinum, hevur sín uppruna í Afghanistan, og í ár verður útflutningurin so stórur sum kanska ongantíð fyrr, skrivar bretska blaðið The Guardian. Síðani innrásina hava bretar havt ábyrgdina av at avmarka teir ovurstóru rúsevnatrupulleikarnar í Afghanistan, men bretskir embætismenn viðganga fyri blaðnum, at allar royndir at avmarka framleiðsluna eru miseydnaðar.

Tað eydnaðist Talibanstýrinum at steðga rúsevnaframleiðsluni, og bøndurnir vórðu hóttir við lívinum, gjørdu teir ikki eftir boðunum frá myndugleikunum. Men síðani innrásina í 2001 er framleiðslan vaksin í stórum, og í dag dyrka bøndurnir næstan bara opium.

Trupulleikin er, at tað loysir seg betur hjá bøndrunum at dyrka opium enn hveiti og annað. The Guardian skrivar, at teir sokallaðu rúsevnabarónarnir bjóða bøndrunum tíggju ferðir meiri, enn teir kunnu fáa burtur úr at dyrka hveiti. Tað er ikki so løgið, at bøndurnir taka av, og hjá nógvum bøndrum er rúsevnið álitið, skrivar blaðið.

Tað sæst eisini í hagtølunum, tí í fjør stavaðu 52 prosent av afghansku bruttotjóðarframleiðsluni frá rúsevnum.

# Neyðugt at byggja búpláss úti í rúmdini



**Skal mannaættin yvirliva, mugu vit byggja búpláss á Mánanum og á Mars. Tað heldur heimskendi alisfrøðingurin Stephen Hawking**

TILVERA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tað er ein ávísur og veksandi vandi fyri, at mannaættin verður oyddav einari ella aðrari vanlukku so sum ov nógvum hita á Jørðini, kjarnorkukríggi , onkrum virusi ella kanska onkrum vanda, sum vit einki vita um enn. Framtíðin hjá mannaættini er treytað av, at hon verður før fyri at finna sær okkurt annað stað í rúmdini.

Orðini eigur heimskendi bretski alisfrøðingurin Stephen Hawking, og áhugin var ovurstórur, tá hann nú um dagarnar helt fyrilestur í Hongkong. Sjálvur heldur hann, at tað ber til at byggja eina støð á Mánanum um eini 20 ár, og at tey fyrstu kunnu seta seg niður á Mars um eini 40 ár.

– Men vit finna einki stað, sum er líka gott sum Jørðin – í hvussu er ikki í okkara sólskipan, sigur Stephen Hawking.

Tann 64 ára gamli Hawking, sum er professari á lærda háskúlanum í Cambridge, er ikki hvør sum helst. Hann hevur granskað rúmdina í mong ár, og bók hansara „A brief History of Time" er sera væl umtókt.

Tað eru kortini ikki øll vísindafólk, sum eru samd við honum, tá tað snýr seg um búsetingarmøguleikarnar úti í rúmdini. Alan Guth, sum eisini er professari á alisfrøði, sigur við AP-tíðindastovuna, at tað er einki, sum bendir á, at tað verður lættari hjá fólki at búgva á Mars enn á Jørðini um eini 50 ár, men hvat tøknin fer at gera møguligt um eini 100 ár, er nakað annað, sigur hann. Sjálvur heldur Alan Huth, at vit eiga at fara niðureftir heldur enn uppeftir.

– Tað mest einfalda er at byggja eina støð undir jørð, eitt nú á Antarktis, sigur hann.